

# Statoil 136 milliardir í yvirskoti áðrenn skatt

Deil:

**Jan Müller**

06.02.2015 - 14:23

Oljan.fo

Statoil legði í morgun fram úrslitið fyri árið í fjør. Ársúrslitið áðrenn skatt varð 136 milliardir norskar krinur. Hetta er væl lægri enn árið fyri, har tað var 163 milliardir norskar kronur. Høvuðsorsøkin til lakari úrslitið er stóra fallið í oljuprísinum. Prísurin á olju var 115 dollarar fyri tunnuna í juni í fjør og fall niður um 50 dollarar fyri tunnuna við ársenda.

Hóast nógv minni verður funnið av olju enn framleitt verður, so var Statoil eitt av teimum feløgunum, sum aftur var millum tey bestu at finna olju. Hóast felagið minkar um sítt virksemi í eitt nú Føroyum, so ætlar Statoil framvegis at brúka nógva orku til leiting framyvir, og væntar at brúka umleið 20 milliardir krónur í 2015 bara til leiting. Samlaða

íløguætlanin hjá Statoil fyri 2015 verður 120 milliardir, sum er 15 milliardir minni enn árið fyri. Statoil framleiðir 2 milliónir tunnur um dagin.

Tað var í fjør, at Statoil boraði 2 brunnar í Føroyum við boripallinum West Hercules, sum nú borar fyri felagið í New Foundlandi, har Statoil hevur funnið nógva olju síðstu árini.